# Fjallaprædikan hjá Louis Houmann



FÓLKAFUNDUR
*Orð og myndir:
Jústinus Leivsson
Eidesgaard*



"Tekur ónøgdin róðrið á lívsleiðini, kann lívið skjótt gerast ein píningur" Hesin setningur rungaði í fjøllunum seinasta sunnudag á fólkafundi uppi á Skarði millum Fuglafjørð og Oyndarfjørð, meðan eg sjálvur stríddi meg niðan Kliv, sum er fyrsta petti av bygdagøtuni millum Hellurnar og Fuglafjarðar, Hellumegin. Setningurin telir 11 orð, knappur og sannur og beinrakin.

Ov seinur á veg sum ikki einaferð var eg, brúdleypið frá náttini fyri í Róðrarneystinum á Agjum, har brúðurin var úr Hesti, og fittur partur av hestffólki var farin úr oynni, sat enn fast í beinunum. Eg var spentur upp á hendan fólkafundin, havi luttikið í fleiri fyrr, og tað sum gjørdi tað serliga spennandi hesuferð var, at bygdamaður mín og grannin Louis Houmann skuldi halda røðuna. Hann er longu byrjaður, nú vit eru komin niðan fyrstu brøttu brekkuna, og eg ergri meg, at eg ikki hoyri hvat hann sigur.

- Víða hvar um heim eru skørð, har mannagøtur ganga um. Rennir mær í huga Runsival og Runsivalstríðið.

*Tá var blóð í Runsivali,*
*sum vant á sævarfoð*
*vilstir vóru tólvjavningar*
*hvør mót øðrum stóð*



*Louis Houmann úr Garðshorni í Oyndarfirði helt røðuna á fólkafundinum.*

- So illa hevur ikki leikað á hesum stað, tó Gulbrandur gamli liggur grivin skamt her frá, fall hann niðri á Hellunum, so brandar hava gjelt her í námindini, segði Louis Houmann uppi á Skarðinum, meðan vit stríddu okkum niðan.

Vit knossa okkum niðan Spreingisbrekku, sum er tiltikin tung, og fleiri fólk eru ávegis. Tað eru fremmandafólk. Beint niðanfyri okkum í brúnni, har Klivin endar, stendur ein telefonpeli so einsamallur eftir. Telefonpelarnir vóru tiknir niður fyrst í sjeyti árunum, teir fylgdu bygdagøtuni og farbróður mín Petur Ejdesgaard av Marknagili í Oyndarfirði var við til at takan pelarnar niður. Hann syrgdi fyri, at hesin eini pelin stóð eftir, soleiðis at fólk altið kunnu finna Klivina, tí bratt og lívshættisligt er báðumegin hana. Onkur kemur av oyndfjarðarvegnum av ovasta svinginum, har er laggongt, men drúgvari. Her eftir gomlu bygdargøtuni eru eisini fleiri fólk. Onkur er frammanfyri okkum, og har niðri gongur Rutt hjá Anskar, sum er 68 ára gomul, búsitandi í Havn, men uppvaksin á Hellunum. Tað er ein øgilig kondi hon hevur. Hon er 18 ár eldri enn eg, og skjótt styttist millum okkum. Hon kemur sum ein fjøður niðan móti okkum og uppi á Skarði, langt frá okkum hevur Louis Houman tosað seg heitan. Tað hoyra vit einki til.

## Og sæla barnaland

Louis røðar nú um barnaárini í Oyndarfirð. Mær er fortalt, at hann var rørdur, tá íð hesin parturin av røðuni kom út í frísku fjallaluftina upp í polarvøkstrinum millum hæddir:

- Sum smádreingir vóru vit sjálvir noyddir at evna flestu leikur, íð við nýttu og vit vóru kreativir. Tráður, bátar og skip vórðu evnað til, onkuntíð við góðari leiðbeining frá Poul Martin, bátasmiði, sum var barnavinur burturav.

- Seiðamurtaveiða og ikki at gloyma, tá íð sjósílini komu niðan at gýta. Vit høvdu Stórá og Laksá og uppi á Vatni, tað var nakað serligt, tí her var so nógv annað, fuglameingið, ryssan Perla, hesturin Svávur. At sita á rossabaki uttan saðil, bert faksið at halda í, tað vóru dagar."

Vit ganga fram við torvheiðunum hjá Hellumonnum. Teir hava altíð verið raskir, sum allir niðursetumenn. Niðursetumenn vóru menn, sum tordu at bróta burtur úr nýggjum og teir høvdu meira drive og meira dirvi enn hinir sum gingu eftir í tí gamla og kenda. Søgan um føroysku niðursetubygdingar vísir hetta. Og ofta hava fólk í gomlu plássunum hug at tosa niður til niðursetufólkini, tí tey innast inni øvunda hesum framfýsnu fólkum, sum tora at fóta sær í óbygdum og tora at líta á egnan mátt og megi. Her standa toftirnar av fleiri grothúsum við stórum steinum langt upp í veggin. Sterkir vóru teir. Rutt minnist lív her uppi, tá ið hon var smágenta og fólk vóru í torvi og tað er í dag ein fullkomiliga farin tíð. Teir gomlu heilsa okkum ósjónligir í niðurdotnum kráum og aftur í benið á torvheiðunum, meðan vit streva okkum niðan á Skarðið og Louis Houmann er farin at samanbera nýggju tíðina við, tá íð hann var smádrongur.

- Í dag er tað handilsvinnan, íð stýrir barnaspælinum við leikum, teldum og videospølum við skotum og drápum, nú á døgum skulu børn hoyra og síggja alt. Máti skal vera við, hjá mær og mínum javnlíkum sóu vit 3-4 Geytafilmar, áðrenn vit vóru fyltir 14, nú eru fleiri filmar og teldospøl um dagin, kanska eru børnini í einum øðrum heimi um dagarnar, segði Louis Houman

Louis Houmann røðir uppi á Skarðinum og vit koma við sveitta brot niðan í móti. Eru nú sløttanum og vinda okkum niðan. Síggja beint yvir á Sandrókina,